# Turrur fiskur, skundve



*Ræstur ella turrur fiskur hava verið lívrættir hjá mongum føroyingi ígjøgnum øldir*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Smávísindaligar hugleiðingar um siðbundna framleiðsla og nýskapan í útnorðri, hugkveiktar av einum turrum fiski í einum plastikkposa á køksborðinum ein leygardag um døgurðatíð. Etin saman við lakaspiki frá seinastu grindini í Havn. Spikfjósina handaði sjálvur borgarstjórin, tá hann saman við øðrum býtti út grind til fólkið. Hetta er seinni partur av tveimum**

SIÐSØGA
*Jóan Pauli Joensen*
*professari*



Eins og í Noreg varð bæði stokkfiskur og ráskorðin fiskur (ráskerðingur) framleiddur í Føroyum fyrr í tíðini. Stokkfiskurin varð greipaður rundur, meðan tann stóri og tjúkki fiskurin varð ráskorin. Ein ráskorin fiskur varð klovin frá ugga og aftur í klingruna ella sporlið, so hann kundi heingjast upp at turka so at hann varð vindgosin uttan at úlna. Umleið ein triðingur av rygginum varð skorin burturúr. Aftasti triðingurin av rygginum hoyrdi upp í aðra helvtina av fiskinum og gjørdi, at fiskurin var stívari og ikki kom saman. Handilsligi týdningurin av stokkfiskinum fánaði burtur í lítið og einki í einahandilstíðini frá 1524-1856. Hinvegin hava føroyingar áhaldandi turkað fisk til egna nýtslu, men eftir tað, at føroyingar frá fyrra parti av 1800-talinum fóru at virka klippfisk, varð allur tann stóri fiskurin seldur, flaktur og saltaður men seiður og smáfiskur,